# Hansinu Mortensen til minnis

Leygardagin 13. januar andaðist mín kæra omma til stóra sorg fyri familju, vinur og kenningar.

Hon hevur havt eitt gott og langt lív, sum eg eri so glað fyri at hava verið ein partur av. Eg minnist, sum var tað í gjár, tá eg eftir skúlatíð fór vestur til ommu at eta døgurða. Og ikki minst tá eg svav uppi á kvistinum í hennara bleytu song. Tá eg var hjá ommu, hugnaðu vit okkum. Hon forkelaði øll seks ommubørnini, og hennara kærleiki til okkara var ómetaligur.

Hennara stóri áhugi var ommubørnini. Hon vildi altíð hoyra um okkara upplivingar bæði innan ítrótt, skúla og hvat vit enn fingust við. Hon var stolt av okkum og dámdi sera væl, tá vit vitjaðu hana.



Hon hevur verið og fer altíð at vera ein stór inspiratiónskelda hjá mær. Hennara dugnaskapur, gleði og lívsáskoðan. Og ikki minst hennara vilji minna meg á, at sjálvt um lívið ikki altíð er ein dansur á rósum, so er vón fyri framman. Tað skal nok ganga.

Í tíggju ár sat hon lammað, men hon gav aldrin upp. Hennara vón og kærleiki til familjuna góvu henni eitt langt og gott lív.

Sjálvt um sorgin er stór. Saknurin enn størri, so verma minnini. Tey geva mær vón, um at alt nokk skal ganga.

Vit eru øll kedd um ommuna, vit elskaðu hana. Hon var eitt sjálvsamt menniskja, sum vit onnur bara kunnu royna at lata okkum inspirera av. Menniskju sum hon fylla nógv í lívinum, og tí er eisini eitt stórt tómt hol eftir, nú hon ikki er millum okkara longur. Holið kunnu vit ikki fylla aftur eftir einum degi ella ári. Kanska tað slett ikki skal fyllast aftur, men ístaðin vera holið til minnini, sum vit hava. Minnini eru dýrabar.

Við takksemi fyri at hava verið ein partur av hennara lívi vil eg minnast mína góðu ommu, sum hon altíð var. Positiv, lívsglað og erlig. Og eg hoyri enn hennara sprutlandi látur, tá eg vil.

Ærað veri hennara minni.

**Tóra Effersøe Mortensen**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Kristoffur Svabo Joensen, Argir**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 2. mars klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju leygardagin 3. mars klokkan 13. Tey ið vilja minnast Kristoffur kunnu lata Argja kirkju eina peningagávu konta í peningastovnunum.

**Tórbjørn Thorsen úr Vági** andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin 28. februar, 64 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum leygardagin klokkan 17 í Bethel. Jarðarferðin verður úr Bethel sunnudagin klokkan 13. Tey ið vilja minnas Tórbjørn kunnu lata eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini, konta í Føroya Banka.

**Anna Blicher Winther, Keypmannahavn**, fyrr búsitandi á Sandi, andaðist 26. februar, 76 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin 3 mars klokkan 13 (donsk tíð) úr Absalons Kirke. Sønder Boulevard 73. København V.

**Beata í Dali**, fødd Mørkøre búsitandi í Havn andaðist á Landssjúkrahusinum 28. februar 86 ára gomul.

**Tine Hammer**, kona Rúna Hammer, andaðist mándagin 26. februar á Århus Kommune hospital, 28 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin 3. mars klokkan 13.30 frá Sankt Johannes kirke, Johannes Allé 1, 8000 Århuus C.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá okkara kæra mamma

**Bergtóra Dragasund**

andaðist og fór til gravar.
Takk til Sonju Klein, prest, og kirkjutænarar.
Takk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum og á Heimatænastuni - Nærverkinum.
Takk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Rebekka og Janus**

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu føðingardag okkara 13. og 15. desembur so góðan og ógloymandi.

**Heilsan Jákup og Nancy, Fámjin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu okkum hjálp og samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, abbi, langabbi og verfaðir okkara

**Justinus S. Hansen**
Saltangará

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til Jóannes Hansen, Meinhard Bjartalíð, Poul Færø, kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum og komu við køkum.
Ein heilsan til starvsfólkið á heiminum á Mýrunum fyri hjálp og umsorgan tíðina hann var hjá tykkum.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Olivia og Svend**

**80 ár**
Leygardagin 3. mars verður Lars Larsen, Tórshavn, 80 ár. Dagurin verður hildin við móttøku á Hotel Vágum leygardagin frá kl. 13.00-16.00.

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. mars 2007 giftast Inga Maria Vang, Hoyvík, og Júst Svínoy, Runavík. Vígslan verður í Listaskálanum kl. 11.30. Veitslan verður á Hotel Føroyum fyri innboðin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 3. mars hava hjúnini Óluva og Óli Fuglø Norðdepli gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Prógv

31. desember 2006 fekk Jóhan Helmsdal, Toftir, sveinabræv frá Aalborgs Tekniske Skole sum kokkur, hann hevur lært á Hotel Hafnia, Tórshavn.

21. februar 2007 tók Janus Jensen, undirvísingarleiðari, Toftir, kandidatprógv í námsfrøði (cand.pæd.pæd) á Danmarks Pædagogiske Universitet í Keypmannahavn.

31. desember 2006 fekk Jóhan Helmsdal, Toftir, sveinabræv frá Aalborgs Tekniske Skole sum kokkur, hann hevur lært á Hotel Hafnia, Tórshavn.

21. februar hevur Eydna Hansen, Kaldbak, fingið prógv sum Heilsurøktari á Humanica í Hillerød.

21. februar 2007 tók Janus Jensen, undirvísingarleiðari, Toftir, kandidatprógv í námsfrøði (cand.pæd.pæd) á Danmarks Pædagogiske Universitet í Keypmannahavn.

23. januar tóku systrarnar Jórun og Eyðbjørg Jacobsen prógv sum bachelor pedagogar á Danner Seminarium.

**Dagurin**

**3. mars. Húngunn**, deyð ár 1003. Føroysk eftirgerð av týska navninum Kunigunde og varð skrivað Kunigunn, tá ið álmanakkin kom á føroyskum. Hon varð gift týska keisaranum Heindrikki II og læt byggja bæði kleystur og kirkjur. Navnið merkir mæt stríðskvinna.

**4. mars. Adrianus**, deyður umleið ár 300. Keisarligur rómverskur embætismaður sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum. Navnið merkir maður úr Adria í Norðuritaliu. Navn á fleiri keisarum. Magnus Heinason føddur hendan dagin í 1545.

**5. mars. Teophilus**, deyður umleið ár 200. Embætismaður í Kesarea. Navnið merkir hin guðelskandi